# Viðtøkur fyri 07 Vestur

*(Upprunaliga frá 6. novembur 2007, broyttar á eykaaðalfundi 11. novembur 2016)*

**§1 Navn og heimstaður**
Navn felagsins er **07 Vestur (hjánøvn: )**, og heimstaður er Vágar.

**§2 Endamál**
Endamál felagsins er, at íðka og menna fótbóltsspælið í Vesturøkinum

**§3 Limaskapur**
Ein og hvør kann gerast limur við at venda sær til annaðhvørt ein nevndinaarlim ella eitt møguligt skrivstovufólk hjá felagnum. Ein samd nevnd kann nokta persóni limaskap. Verður persóni noktaður limaskap, kann hann leggja spurningin fyri aðalfund til støðutakan.
Feløg og onnur kunnu gerast hvílandi limir.
Nevndin ásetur støddina av limagjaldinum fyri virknar-, hvílandi- og ungdómslimir. Limur kann siga limaskap sín upp við einum mánaðafreist til ein 1. í einum mánaði. Nevndin kann koyra lim úr felagnum, um viðkomandi er í eftirstøðu við limagjaldi í meiri enn 1 ár, hevur brotið viðtøkur felagsins ella á annan hátt grovt hevur forbrotið seg. Viðkomandi limur kann leggja spurningin fyri fyrst komandi aðalfund til støðutakan.
Felagið kann útnevna heiðurslimir.

**§4 Aðalfundir**
Aðalfundurin, sum verður hildin í heimstaði felagsins, er hægsti mynduleiki felagsins.
Ársaðalfundur verður hildin, í seinasta lagið 4 vikur eftir kappingarlok.
Nevndin kallar inn til aðalfundar skrivliga á heimasíðu og miðlum, ella við uppslagi, við í minsta lagi 14 daga freist. Í innkallingini skal verða sagt frá fundarstaði, -tíð og –skrá.
Mál, sum limir vilja hava til viðgerðar, skulu vera nevndini í hendi í minsta lagi 12 dagar undan aðalfundinum. Í fundarboðunum verða innkomin mál stutt endurgivin, men skulu liggja frammi í fullum líki á skrivstovu felagsins í minsta lagi 8 dagar undan fundinum.

Á ársaðalfundinum er fundarskráin hendan:

- Val av fundarstjóra
- Frágreiðing nevndarinar fyri farna árið.
- Val av nevndarlimum og tiltakslimum
- Innkomin mál
- Ymiskt

Fundarstjórin ger av í øllum ivaspurningum á fundinum. Hann kann vera nevndarlimur.
Atkvøðugreiðsla fer fram skrivliga, um ikki aðalfundurin góðkennir annan atkvøðurætt. Valbærur er limur, sum er fyltur 18 ár.
Hvílandi limir hava møti- og talurætt, men tó ikki atkvøðurætt.

**§5 Reglulígur eykaaðalfundur**

Regluligur eykaðalfundur verður hildin í í heimstaði felagsins í seinasta lagi í februar.
Mannagongdin á eykaaðalfundi er tann sama sum á ársaðalfundi.

Á regluliga eykaaðalfundinum er skráin hendan:

- Framløga av rokniskapi og fíggjastøðu til góðkenningar
- Val av granskoðara
- Ymiskt

**§6 Eykaaðalfundur**

Eykaðalfundur verður hildin tá ið nevndin heldur tað vera neyðugt ella tá 1/3 av limunum krevja tað.
Mannagongdin á eykaaðalfundi er tann sama sum á ársaðalfundi.

**§7 Nevndin**

Felagið verður stýrt av eini (minst) 3 manna nevnd. Nevndarlimir verða valdir annaðhvørt ár.
Soleiðis at annaðhvørt ár standa 1 (ella fleiri) fyri vali og annaðhvørt ár standa 2 (ella fleiri) fyri vali. Nevndin skipar seg sjálv.
Tiltakslimir kunnu verða valdir fyri sama tíðarskeið. Nevndin heldur fund, so ofta hon heldur tað verða neyðugt.
Nevndin er viðtøkufør, tá ið 3 nevndarlimir eru á fundi.
Nevndin kann gera reglugerð fyri virksemi sítt. Fer nevndarlimur frá í úrtíð, kemur fyrst standandi tiltakslimur í hansara stað.
Gerðabók verður førd fyri allar aðal- og nevndarfundir.
Nevndini er loyvt at skipa undirnevndir við ábyrgd av ávísum virksemi.

**§8 Tekningarreglur**

Felagið verður teknað av samlaðu nevndini. Til keyp, sølu ella vegseting av føstum ognum krevst aðalfundarsamtykt.

**§9 Heftilsi**

Felagið heftir bert fyri skyldum sínum við teimum til ein og hvørja tíð verandi ognum, sum hoyra felagnum til. Limir ella nevnd hefta ikki persónliga fyri felagsins skyldum, men bert við sínum limagjaldi.

**§10 Roknskapur**

Rokskaparár felagsins er frá 1. januar og til 31. desember.

Roknskapurin verður grannskoðaður av einum á aðalfundi valdum grannskoðara, sum hevur rætt at kanna felagsins bøkur og skjøl, tá ið hann ynskir tað.

**§11 Viðtøkubroytingar**
At broyta viðtøkurnar krevst, at í minsta lagi 2/3 av møttu limunum atkvøða fyri.

**§12 Avtøka**
At taka felagið av krevst, at í minsta lagi 2/3 av limum felagsins eru á fundi og samstundis eisini atkvøða fyri.
Er ikki neyðugi meirilutin á fundi, kann nevndin kalla inn til eykaaðalfundar, har felagið kann verða tikið av, um 2/3 av givnu atkvøðunum eru fyri, líkamikið hvussu nógvir limir eru møtti.
Verður felagið tikið av, velur aðalfundurin ein ella fleiri ligvitorar. Eitt møguligt avlop skal nýtast til eitthvørt ítróttarligt ella vælgerandi endamál.

**§13 Venjarar**
Venjarum er ikki loyvt ábyrgd í vaksnamannadeild og ungdóms-og barnadeild í samstundis.

Soleiðis samtykt á eyka-aðalfundi 11. novembur 2016.

Jarnhøld Nattestad
Fundarstjóri